# Nøvn

## Føðingar



*Tann 3. februar fekk eg eina lítla fitta systur sum vigaði 4060 gr. og var 50 cm long. Foreldrini hjá okkum eita Archibald Andreasen og Elsa Bech, og vit búgva í Malmø*

12. mars fingu Maria Chun Nielsdóttir og Ian Salter, Banyuls sur Mer, Frakland, ein son. Hann var 50,5 cm langur og vigaði 3320 gr.

14. mars fingu Dora og Niels Pauli Nónstein, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon vigaði 3980 gr og var 51 cm long.

18. mars fingu Ruth m. Garðarnar og Magnus Berg, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4020 gr.

24. mars fingu Aðalbjørg J. Linklett og Mortan Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

24. mars fingu Anna Maria K. og Kári Henriksen, Nesi, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

26. mars fingu Jónfríð Eyðunsson, Toftum, og Lasse Bøg Rom Jensen, Svendborg, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4385 gr.

27. mars fingu Randi Hansen og Símun J. Hansen, Runavík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

27. mars fingu Kristfríð Dam Jacobsen og Óli Jóhan Láberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3995 gr.

28. mars fingu Kristvør og John D. Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 4300 gr.

28. mars fingu Anna-Lis og Jens Petersen, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4100 gr.

29. mars fingu Annika Lómstein Petersen, Oyndarfirði, og Fríði Reinert Djurhuus, Innan Glyvur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4150 gr.

## Heilsuhjálparar



*25. mars 2011 fingu 14 heilsuhjálparar prógv á Heilsuskúla Føroya.*
*Aftast frá vinstru: Karl Andras Poulsen Fámjin, Una Staksá Tórshavn, Sissal Justinussen Tórshavn, Eyðfríð Andreasen Klaksvík, Ebba Jacobsen Haraldsund, Lis Williamsdóttir Sørvágur, Hallgerð Lenudóttir Klaksvík og Tórur Sørensen Porkeri.*
*Fremst frá vinstru: Jacoba Winther Skopun, Anita Eidesgaard Tórshavn, Iris Franksdóttir, Tvøroyri, Gunvør Ehlers Gásadalur, Sólfríð Vang Tvøroyri og Helga Johansen Klaksvík.*

## Merkisdagar

**85 ára føðingardagur**
Leygardagin 2. apríl verður Franklin Michaelsen, Klaksvík. Hann er burturstaddur.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 1. apríl fyllir Ruth Nolsøe, Vágur, 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 2. apríl á Hotel Bakkin frá kl. 12-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Tórsdagin 7. apríl fyllir Lena Magnussen, Vágur, 70 ár. Dagurin verður hildin í heiminum frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Týsdagin 5. apríl fyllir Erland Rasmussen, Argir, 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 2. apríl frá kl. 19 á Vinnuháskúlanum, Nóatún 7. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. apríl, giftast Annika Hansen, Klaksvík, og Ólavur J. Østerø, Tórshavn. Vígslan verður í Christianskirkjuni kl. 14 og veitslan fyri innboðnum í Hølunum hjá Dansifrøð, Tórshavn.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. apríl giftast Gunnvá í Liða, Tórshavn og Jóhannes Arge, Hoyvík. Vígslan verður í fríkirkjuni Oasan kl. 12, og veitslan verður fyri innbodnum kl. 16 á Hotel Føroyum. Kl. 20 verður opið hús við kakuborði á Hotel Føroyum, har øll eru vælkomin.

### *Birgit av Lofti takkar*

*Hjartaliga takki eg tykkum, sum gleddu meg
og hátíðarhildu sjeyti ára dagin saman
við mær í skúlaheiminum í Havn,
tit sum sendu heilsanir og ringdu til mín.
Tøkk til Ebenezerkórið, Svein Petersen,
Gotfred Joensen, tónleika- og sangbólkin "4"
og synirnar, Petur og Marner,
sum spældu og sungu fyri mær!
Tøkk tit, sum leiddu hátíðarhaldið, tit ið
prýddu borðini, bakaðu, bóru fram heilsanir
og tit, sum skipaðu tað tøkniliga,
so øll hoyrdu og sóu.
Hjartaliga tøkk øll somul!*



*Vinarliga
Birgit av Lofti*